# ARB-Vegleiðing

# V-C002-1

**Nýtsla og viðlíkahald av gaffiltrukkum**

# 2007/11

# Arbeiðseftirlitið

## Hvat er ein ARB-Vegleiðing?

ARB-vegleiðingar vegleiða um hvussu reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini skulu skiljast/tulkast. ARB-vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum (lóg og kunngerðir),
- greiða frá hvussu krøvini í reglunum kunna lúkast í royndum,
- greiða frá vitan um tulkingar av reglunum í samband við dómar,
- greiða frá hvussu arbeiðsumhvørvislógin er samansett og hvørji øki hon umfatar.

## Er ein ARB-vegleiðing bindandi?

ARB-vegleiðingar eru ikki bindandi fyri virkir, trygdarskipan e.o., men vegleiðingarnar eru skrivaðar út frá reglum (lóg og kunngerðum), sum eru bindandi.

Arbeiðseftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskila í eini vegleiðing.

Virkini kunna loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðseftirlitið vil tá meta um, um hesin háttur er líka so tryggur og í trá við reglurnar.

**Arbeiðseftirlitið**
**Boks 1400**
**FO-110 Tórshavn**
**Tlf.: + 298 357811**
**Fax.: + 298 357810**
**T-post.: arb@arb.fo**
**Heimasíða: www.arb.fo**

## KAPITTUL 1

***Øki og lýsing.***

**§ 1.** Vegleiðingin fevnir yvir allar gaffiltrukkar, bæði eldrivnar og við brennievnismotorum. Allir gaffiltrukkar skulu lúka treytirnar, ið eru ásettar í kunngerð nr. 74 (K-E015-1) um innrætting av tekniskum hjálpartólum, og nr. 126 (K-E015-2) um nýtslu av tekniskum hjálpartólum.

## KAPITTUL 2

***Nýtsluforskrift.***

**§ 2.** Útvegarin skal við sølu, leigu ella láni av gaffiltrukki, altíð lata eina skrivliga nýtsluleiðbeining á føroyskum máli (danskt, norskt og svenskt mál kann loyvast), ið greiðir frá handfaring, nýtslu og viðlíkahaldi av gaffiltrukkinum.

**Stk. 2.** Leiðbeiningin skal í neyðugum úrdragi verða sett á sjálvan trukkin, sum t.d. lastatalvan, ið týðiliga skal kunna síggjast frá førarasessinum.

## KAPITTUL 3

***Innrættningur.***

**§ 3.** Tak skal verða tak yvir førarasessinum, sum trygt verjir førarin móti fallandi góðsi.

Undantiknir fyri tak eru:

1. Trukkar, sum í mesta lagi hava eina lyftihædd uppá 1 metur, og sum koyra millum góðs, sum ikki er stáplað hægri enn 2,25 metrar.
2. Trukkar, sum førarin gongur aftaná ella stendur á, og tá støðuplássið ikki forðar fyri rýmingarmøguleika.

## KAPITTUL 4.

***Nýtsla.***

**§ 4.** Trukkurin skal nýtast á forsvarligan hátt og bert til tað, hann er ætlaður til.

**Stk. 2.** Trygdarlutir og onnur verndarútgerð mugu ikki takast burtur, meðan trukkurin er í nýtslu.

**Stk. 3.** Trukkurin og gaflarnir mugu ikki ovbyrjast. Gaflarnir mugu ikki brúkast beinleiðis sum kranakrókar.

**Stk. 4.** Øll hjálpiútgerð, t.d. framleingjaragaflar, klemmur, dorar, kranaarmar v.m. mugu bert nýtast sambært leiðbeining frá útvegara og altíð soleiðis, at trukkurin ikki verður ovbyrjaður og støðufesti ikki verður minkað.

**Stk. 5.** Trukkurin má bert nýtast til ferðafólkaflutning, um hann er innrættaður til hetta endamál.

**Stk. 6.** Trukkurin má ikki nýtast sum persónlyfta. Tó kann hetta loyvast undir serligum treytum, sum givnar eru í Vegleiðing nr. V-C002-2 um persónlyft við gaffiltrukki.

**Stk. 7.** Gaflarnir skulu verða niðri og masturin hella afturá, tá koyrt verður við last, og gaflarnir skulu setast niður á gólvið, tá førarin fer frá trukkinum.

**Stk. 8.** Trukkur við last skal bakka, tá hann skal koyra undanbrekku og tá lastin forðar fyri útsýni.

**Stk. 9.** Trukkur má bert nýtast á støðum, har hetta kann gerast forsvarliga. Undirlagið (vegur, rampa, gólv, gólv millum hæddir, lyftir v.m.) skal við vissu kunna bera trukkin við fullari last. Í ivamálum má byggimyndugleikin spyrjast, hvussu nógv ávísa undirlagið, t.d. eitt gólv millum hæddir, kann lastast við.

**Stk. 10.** Ferðsluvegir eiga at verða stríputir og frásetingar- og vendipláss eiga at verða merkt. Tað kann í ávísum føri verða neyðugt, at ferðslan verður skipað einvegis.

**Stk. 11.** Tá koyrt verður á egnum øki, har eingin almenn ferðsla kann koma fyri, nýtist trukkurin bert at hava tey ljós, ið eru neyðug til sjálvt arbeiði.

**Stk. 12**. Verður koyrt á økjum, ið eru umfataði av ferðslulógini, skal trukkurin verða útgjørdur við forlygtum, baklygtum, bremsuljósi, avvísrarljósum og endurskini, eins og vanligur bilur.

**Stk. 13**. Innandurakoyring við trukkum, ið nýta brennievnismotorar er ikki loyvd - sí kunngerð nr. K-C002-2 frá 17. mai 1984. Elektriskir trukkar krevja ikki nakað eyka ventilatión í rúmum har teir arbeiða, men løðing av ravløðunum (akkumulatorunum) má bert gerast í rúmum við munadyggari ventilatión - sí leiðbeining nr. L-C002-1frá 2. august 1984.

## KAPITTUL 5.

### *Viðlíkahald og 12 mánaðarkanning.*

**§ 5.** Trukkurin skal viðlíkahaldast, soleiðis at hann altíð er í góðum og forsvarligum standi. Leiðbeiningarnar frá útvegaranum og galdandi reglur frá Arbeiðseftirlitinum um kanning og viðlíkahald skulu fylgjast.

**Stk. 2**. Stýriútgerð, bremsir, dekk, floyta og ljós, skulu altíð verða í lagi. Sama er galdandi fyri brenningina, tá talan er um brennievnismotorar.

**Stk. 3.** Gaflarnir og keturnar, ið bera gaflarnar, skulu verða í lagi. Um ikki útvegarin hevur fyriskrivað annað, eiga gaflarnir og keturnar at kannast minst eina ferð um árið.

**Stk. 4.** Gaflarnir skulu javnan kannast fyri slit, rivur og avskapan. Gaflarnir mugu bert umvælast av serkønum fólki og bert eftir ávísing frá útvegara. Gaflarnir skulu roynast aftaná umvæling eftir Dansk Standard, núverandi nr. DS 2135.

**Stk. 5.** Gaflarnir skulu skiftast út, tá gaffilhælurin er slitin so nógv, at bert 90% av uppruna tvørmátinum er eftir.

**Stk. 6.** Ketur mugu ikki vera longdar meira enn 2 %, frá upprunamátið. Ketur mugu ikki umvælast, men skulu skiftast út. Tó kann eitt einstakt ketulið, ið hevur verið fyri ovbyrjan, skiftast út við eitt rætt útskiftingarlið.

**Stk. 7.** Umframt at omanfyri nevndu krøv altíð skulu verða fylgd, skulu trukkarnir í minsta lagi eina ferð í hvørjum álmanakkaári, til kanning hjá sakkønum virki, við serligum sakkunnleika á hesum øki, og sum er góðkent av Arbeiðseftirlitinum, til hetta arbeiðið. Sí Vegleiðing nr. V-C002-3 um góðkenning av virki, at kanna gaffiltrullar.

**Stk. 8.** Kanningin skal gerðast eftir teimum reglum, sum framleiðarin setir, tó skulu fylgjandi øki altíð kannast:

1. mekaniskir lutir, so sum ketur, gaflar, bremsur v. m.,
2. trygdarútgerð,
3. rørslu-knøttar,
4. drívmegi t.v.s. motorar - elmotorar,
5. hydraulikkur og
6. el-útgerð.

**Stk. 9.** Virkið, ið framt hevur 12 mánaðarkanningina, gevur eina váttan, saman við eini ástempling, áðrenn trukkurin aftur fer í vinnu. Váttanin hevur gildið 12 mánaðar fram, um so er at einki óvantað hendir.

**Stk. 10.** Eigarin av trukkinum hevur ábyrgdina av, at avrit av váttan og kanningarlistum verða latin Arbeiðseftirlitinum, so skjótt kanningin er liðug.

**Stk. 11.** Umvæling, viðlíkahald og kanning má bert fara fram tá trukkurin er tikin úr nýtslu.

**Stk. 12.** Tað er skylda eigarans, at avrit av dagførdum váttanum og kanningarlistum v. m., til eina og hvørja tíð finnast í eftirlitsbókini fyri viðkomandi trukk.

**§ 6.** Til allar trukkar skal finnast ein eftirlitsbók., ið skal goymast nærhendis útgerðini.

**Stk. 2.** Eftirlitsbókin skal lýsa trukkin við viðkomandi uppýsingum, t.d. framleiðslumerki, fram- leiðarans navn og bústað, framleiðslunummar, framleiðsluár, mest loyvdu last (SWL) og lastartalvur v.m. Umframt hesar upplýsingar skal í eftirlitsbókini vera:

1. váttan um royndir t.d. lastroyndir,
2. váttan um 12 mánaðarkanning,
3. upplýsing um umvælingar, feilir v.m.
4. upplýsing um boð frá Arbeiðseftirlitinum viðvíkjandi útgerðini.

**§ 7.** Arbeiðseftirlitið hevur eftirlit við trukkum, fyri at staðfesta um fari er fram eftir galdandi reglum. Arbeiðseftirlitið fremur eftirlitini uml. 24. hvønn mánaða.

**Stk. 2.** Fyri eftirlit og royndir v.m., Arbeiðseftirlitið ger í samband við trukkar, skal eigarin, ella tann, ið ábyrgdina hevur av nýtsluni, lata eitt gjald, ið er ásett av Landsstýrinum.

## KAPITTUL 6.

***Trukkførari*.**

**§ 8.** Trukkførari skal hava fylt 18 ár og skal hann hava trukkføraraprógv - sí kunngerð nr. K-C002-1 frá 18. juli 1985 um loyvisbræv at koyra gaffiltrukk.
Verður koyrt á økjum, ið eru umfataði av ferðslulógini, krevur ferðslulógin í minsta lagi koyrikort til traktor ella persónbil.
Sí Umfarskriv nr. U-C002-3 um trukkoyring uttan koyrikort samb.ferðslógini

**Stk. 2**. Trukkførarin skal leiðbeinast um serlig viðurskiftir á virkinum, t.d. hvussu nógv gólv mugu lastast, ferðsluvegir og stáplingarhættir. Førarin skal eisini leiðbeinast um sína ábyrgd fyri ferming og koyring. Hann kann straffast fyri óforsvarliga stápling og koyring - eisini um hann koyrir ávirkaður av rúsandi evnum.

## KAPITTUL 7.

***Gildi fyri vegleiðingina*.**

**§ 9.** Hendan vegleiðing kemur í gildi 1. januar 2008

**§ 10.** Samstundis fer úr gildi reglugerð nr. R-C002-1, um gaffiltrukkar.

**Arbeiðseftirlitið**, 26. november 2007

__________________________

Karl Joensen, stjóri (sign.)